




# Deildarleiðari til B7

Sum ein liður í umleggingunum á medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum, letur B7 uppaftur í nýggjum hami eftir ætlanini 1. januar 2007. Tí søkja vit eftir deildarleiðara, til at røkja hetta starvið fulla tíð til setan 1. desember 2006 ella eftir avtalu.

B7 og E3 verða nú lagdar saman, í nýumvæld hølir á B7, og deildin hevur 18 seingarpláss. B7 er ein medisinsk deild við sergreinum innan lungamedisin, nefrologi, onkologi og reumatologi. E3 er eisini ein medisinsk deild og hevur sergreinar innan uppafturvenjing av apoplexisjúklingum og sjúklingum við diss. scelerose, umframt at deildin hevur viðgjørt og røktað sjúklingar við húðasjúkum.

**Vit ynskja, at tú ert áhugað/ur í**
· At menna eina gamla deild í nýggjum hami saman við kompetentum starvsfelagum
· At skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga
· At tryggja góða upplæring til nýggj starvsfólk
· At seta í verk fakligu menningina av røktarstarvsfólkunum
· At verða við at implementerað THS

**Krøv til umsøkjarin eru**
· Prógv og góðkenning sum sjúkraktarfrøðingur
· Royndir innanfyri onkrar av sergreinunum á deildini
· Góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
· Áhuga fyri leiðslu
· Kann arbeiða sjálvstøðugt, kreativt og hava visiónir
· Kunnleiki innan EPJ/THS (jorunalskipanina)

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
At standa fyri tí dagligu leiðsluni á deildini, tryggja kvalitetin í sjúkrarøktini, starvsfólkamenning, seta mál fyri sjúkrarøktini og hava ábyrgdina av fíggjarstøðuni.
Deildarleiðarin hevur, innan sjúkrarøktarfakliga øki, tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á medisinska deplinum.

**Lønar- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið
**Starvslýsing og fleiri upplýsingar** fáast við at venda sær til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktar-frøðing, telefon 304500 lokal 6102 ella t-post asap@lsh.fo
**Umsóknarfreistin er** 3. november 2006 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*
**Skrivlig umsókn** við CV, autiorisatión, avrit av prógvum, skjølum o.l. skal sendast til

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Starvsfólkadeildin

**Landssjúkrahúsið**
**Lønar- og starvsfólkadeildin**
**FO 100 Tórshavn.**

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!